# Stressað og stuttlig avbjóðing



**Í kvøld, fríggjakvøld, skal Guðrun Sólja Jacobsen kappast millum stjørnur í kappingini Stjøra eittt kvøld á DR. - Tað er ein onnur kensla hesaferð. Og tað siga øll tey luttakandi. Tað er sum um at tað hesaferð verður leitað eftir einum veruligum vinnara. Hetta er jú endaliga umfarið millum úrvalslið av stjørnum. Vónin er altíð at vinna. Men ein má taka tað við løttum sinni, sigur Guðrun Sólja Jacobsen**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fríggjadagurin verður langur og strongdur hjá Guðruni Sólju Jacobsen. Tá luttekur hon í kappingini Stjørna eit kvøld hjá DR-endaliga kappingin í bestu senditíð. Mikukvøldið hevði hon bert verið til ein fund við sendileiðsluna og ikki fyrr enn fríggjadagurin upprennur, verður hol sett á.

Tá verða kameraroyndir, ljóðroyndir og endaligar royndir, generalroyndir. Kameraroyndirnar merkja m.a., at luttakarar fáa at vita hvar upptøkutólini eru og hvar best er at venda sær og so framvegis. Ljóðroyndirnar eru bæði til gagn fyri sangarar, men sanniliga eisini tøkningarnar og generalroyndin er síðsti møguleikin, innan stóra slagið.

- Tað verður ein strævin dagur, men strævin á ein stuttligan hátt, sigur Guðrun Sólja, tá hon blíð ringir uppaftur mikukvøld, eftir at vit allan mikudagin hava roynt at fingið fatur á henni.

- Eg havi verið í føðingardagi, er rímuliga umberingin.

### Hugsa tær - Imagine

Guðrun fer at framføra lagið hjá John Lennon, Imagnie. Eitt lag, sum hon altíð syngur, tá hon sjálv bert skal murra eitt lag fyri sær sjálvari, og eitt lag, sum hon ofta framførir, tá meira lættar framførslur eru á skránni á heimavølli.

- Eg vil tó siga, at talan er um eina eitt sindur øðrvísi framførslu av lagnum. Tó er grundin hin sama. Hetta er ein ballada. Men roynt verður líkasum at gera sangin størri, enn hann vanliga er, við at lata røddina koma meira til sættis, sigur Guðrun.

Guðrun hevur sjálvandi vónina um at koma víðari og at vinna kappingina. Hesa endaligu kappingina millum stjørnurnar. Kappingatumfarið, sum setur punktum fyri kappingina Stjørna eitt kvøld.

- Vónin er altíð at vinna. Men ein má taka tað við løttum sinni, sigur Guðrun Sólja Jacobsen.

Uppá fyrispurning sigur hon, at sjálvsagt vónar hon, at føroyingar fara at stuðla henni, eins og áður, við at atkvøða fríggjakvøldið.

Sjálv hevur hon við ídni og áhuga fylgt við í teimum undanfarnu umførunum.

- Eg havi sitið heima og fylgt við, atkvøtt, rópt og heppað, sigur ein flennandi Guðrun.

### Stúrir fyri Lenu

Men Guðrun er greið yvir, at hetta endaliga umfarið er ein kapping millum stjørnur.

Kennir tú nakran av teimum, ið eru við í sama umfarið sum tú nú frúggjakvøldið?

- Nei, eg kenni ikki øll. Men eg stúri fyri Lene Mathisen, sigur ein ærlig Guðrun, ið als ikki er vís í sini søk.

Guðrun er greið yvir at hetta er harðari kapping, enn stjørnurnar áður hava verið við í.

- Tað er ein onnur kensla hesaferð. Og tað siga øll tey luttakandi. Tað er sum um at tað hesaferð verður leitað eftir einum veruligum vinnara. Hetta er jú endaliga umfarið millum úrvalslið av stjørnum, sigur Guðrun.

### Fløga 7. februar

- At eg syngi Imagine er jú eisini góður lýsingarmøguleiki fyri komandi fløguna, har lagið eisini er á. Men hetta er yvirhøvur eitt feitt lag, sigur Guðrun.

Tann 7. februar kemur nýggja fløgan hjá henni og tað eru navnframir menn, sum eru framleiðslustjórar, nevniliga Poul Halberg og Stig Kreutzfelt. Báðir gamlir í garði innan danskan tónleik.

- Tað hava verið nevndir fleiri útgávudagar, tann fyrsti í august, síðani nú í januar, men nú kom henda kappingin, so nú er endaliga avgjørt, at útgávan kemur tann 7. februar, sigur Guðrun.

Og alt meðan Guðrun, eins og vit onnur, spent ger seg klára til stóru kappingina, arbeiða onnur við framtíðarætlanum. Konsertir heima í Føroyum eru um at koma á pláss og Guðrun verður væntandi eisini við, tá stóru donsku festivalarnir byrja í summar.

- Enn hevur alt verið sum vant, men seinastu tvær vikurnar eru fólk byrjað at tosa við meg um kappingina, tey spyrja um tað ikki eri eg, sum skal verða við, og so framvegis, so áhugin er har, sigur Guðrun, sum vónar góðan stuðul frá føroysku hyggjaunum, tá hon skal kappast millum úrmælingarnar fríggjakvøldið.



## Broyting í skránni

TÓNLEIKUR

Broyting er komin í skránna fyri stuðulstiltakið í Fuglafirði leygarkvøldið. Hóast tey fegin vildu, so liggur ikki fyri hjá Anniku Hoydal og Kára p at taka lut. Fyrireikararnir harmast, tí tað hevði verið kupp at havt tey á palli, men hinvegin fegnast teir um, at restin av fráboðaðu skránni er sum hon skal. Og tað er ein skrá við sera góðum nøvnum, so blómutyssið av føroyskum tónleikarum tekur seg væl út, hóast tvær av stóru blómunum vanta.

**-do-**